# VILJA VERJA FØROYSKT

# MEN SAKNA NÚTÍÐARGERÐ

FØROYSKIR **MIÐNÁMSSKÚLANÆMINGAR** HALDA, AT LÆRUGREININ **FØROYSKT** ER **SIÐBUNDIN** OG **GAMALDAGS**, OG AT HON **EIGUR** AT VERÐA **NÚTÍMANSGJØRD**. SAMSTUNDIS **LEGGJA** TEIR **DENT Á**, AT FØROYSKT MÁ **VERJAST**, SO DANSKT OG ENSKT **IKKI** TROKA TAÐ **BURTUR**. NÆMINGARNIR **HALDA** SEG FÁA **STØRRI** NYTTU BURTUR ÚR **DONSKUM**, TÁ TEIR SKULU LESA **VÍÐARI**, MEN HVAT **SAMLEIKA** VIÐVÍKUR, HEVUR **FØROYSKT** NÓGV STØRSTA **TÝDNINGIN** FYRI TEIR. HETTA VERÐUR **STAÐFEST** Í **RITGERÐ** HJÁ **VÁR Í ÓLAVSSTOVU** UM STØÐUNA HJÁ FØROYSKUM Í **MIÐNÁMSSKÚLANUM**



**SKÚLI**
**Uni Arge**
ua@sosialurin.fo

Í ritgerðini »Mellem tradition og modernitet« frá september 2010 hevur Vár í Ólavsstovu kannað støðuna hjá lærugreinini føroyskt í miðnámsskúlanum. Hon byggir m.a. sína kanning á samrøður, hon hevur gjørt við næmingar í miðnámsskúlunum frá 2002 til 2004. Hvussu er lærugreinin føroyskt við til at menna næmingarnar, hvørja nyttu hava næmingar av henni, og hvønn týdning hevur føroyskt fyri teirra samleika, vóru nakrir spurningar, hon setti sær, áðrenn hon fór undir ritgerðina.

Í flestu orðaskiftum um mál í Føroyum eru føroyskt og danskt mótsetningar, tí føroyskt upprunaliga vann seg fram sum mótmæli ímóti donskum. Óttin fyri, at føroyskt skuldi doyggja út, var áhaldandi til staðar, men við skriftmálinum hjá V. U. Hammershaimb fingu føroyingar sítt týdningarmesta amboð at skapa ein veruligan samleika sínámillum. Skriftmálið gav føroyingum eitt sjónligt prógv um, at teir vóru ikki tað sama, men øðrvísi enn danskarar.

At vinna føroyskum innivist í stovnum í Føroyum, serliga í skúla og kirkju, var ein tung uppgáva. Mótstøðan var mangan stór, eisini millum føroyingar, sum hildu, at føroyskt kundi ikki gerast framkomið mál í eitt nú umsiting og skaldskapi, men var nóg gott at brúka sum heimamál. »Vi føler os fuldstændig som danske,« segði Oliver Effersøe, oddviti í Sambandsflokkinum, í 1906. Men hetta er als ikki støðan millum miðnámsskúlanæmingar í dag.

> *Sum tann triðja møguleikan kendu tey flestu seg sum norðurlendingar og ikki danskarar. Og í fjórða lagi kendu næmingarnir seg um evropearar*

## Eru norðurlendingar

Vár í Ólavsstovu spurdi m.a. í sambandi við ritgerðina, hvønn samleika næmingarnir hildu seg hava. Svarið var, at teir kendu seg at hoyra til bygdina ella býin, teir vóru úr, og Føroyar. Í Havn søgdu tey flestu, at tey kendu seg sum føroyingar, og uttan fyri Havnina segði ein meiriluti, at tey kendu seg at hoyra til bygdina ella býin, tey vóru úr, og síðan til Føroyar. Sum tann triðja møguleikan kendu tey flestu seg sum norðurlendingar og ikki danskarar. Og í fjórða lagi kendu næmingarnir seg um evropearar.

Í ritgerðini staðfestir Vár í Ólavsstovu, at hetta, at føroyskir miðnámsskúlanæmingar als ikki kenna seg sum danskarar ella danskar ríkisborgarar, vísir, at teir mentanarliga fata føroyskt sum eitt sjálvstøðugt mál í norðurlendsku familjuni. Hendan útbreidda fatanin sæst aftur í málkunnleikanum hjá føroyingum, ið sambært norðurlendskari kanning duga best norðurlendsk mál av øllum norðurlendingum. Føroyingar eru rætt og slætt teir norðurlendingar, ið skilja sínar norðurlendsku grannar best.

Men mótsetningar eru innanhýsis í føroyska samleikanum. Toganin stendur ímillum tað siðbundna á bygd og modernitetin serliga í Havn. Miðnámsskúlanæmingar halda, at tá um føroyskt ræður, tosa tey betur føroyskt á bygd, tí har fáast tey við sovorðið sum seyð, fisk og grind. Moderniteturin, sum knýtir seg at býarlívinum, hevur við sær verri føroyskt mál, men moderniteturin er neyðugur, skulu føroyingar fylgja við tíðini, halda nógvir næmingar, serliga í Havn.

Tá næmingarnir skulu meta um, hvussu vit verða so føroysk sum gjørligt, er teirra niðurstøða sostatt, at vit málsliga og ítøkiliga skulu vera knýtt at siðbundna lívinum á bygd. Tá eru vit av sonnum føroyingar. Sjáldan verður tað at vera rættur føroyingur sett í samband við modernitet og býarlív. Og júst toganin millum tað siðbundna og modernitet er eisini høvuðstrupulleikin við føroysktlærugreinini í miðnámsskúlanum.

## Lærugrein í samleika

Í »Bláa álitinum« frá 1990, sum snúði seg um støðuna hjá føroyskum í miðnámsskúlanum, varð spurt, hví danskt var so áhugavert sum lærugrein og ikki føroyskt. Staðfest varð, at danskt aftrat tí at vera lærugrein í máli var lærugrein í mentan og siðsøgu. Næmingarnir lærdu bæði um bókmentir, heimssøgu, list, politiska hugsan og fjølmiðlar í donskum. Í álitinum varð spurt, hví alt hetta mundi vera lagt í lærugreinina danskt í Danmark, og hví hetta átti at verið lagt í lærugreinina føroyskt í Føroyum. Svarið var sjálvandi, at í Føroyum er føroyskt samleikalærugreinin, og í Danmark er samleikalærugreinin danskt.

At hetta ikki hevur verið gjørt nóg miðvíst, og at føroyskt fyrst og fremst gjørdist lærugrein í máli, tá lærugreinin slapp framat í studentaskúlanum, er